# Nikkidukkur o stjórar kollsigl

**BANKAKREPPA** Eitt, sum hevur eyðkent Eik er, at vinnulívsmenn eru settir í leiðslu- og álitisstørv og at forstjórin misti tamarhaldið á teimum Hesir vinnulívsmenn hava eisini veitt lán til sítt egna virksemi og hava verið ógegnigir, sigur Reidar Nónfjall, búskaparfrøðingur



Áki Bertholdsen

– Hvussu kann ein leiðsla uppá tvey, trý fólk átaka sær slíkar váðar, gera stór upp-keyp, gera íløgur í partabrøv av slíkum slagi og støddd, sum talan er um her, umframt at lokka íleggjar við stórum kapitalupphæddum, uttan at nakar er førir fyri at steðga teimum ella vísa á, at her er nakað heilt galið.

Reidar Nónfjall, búskaparfrøðingur og stjóri á Føroya Handilsskúla, sigur, at hetta er tann relevanti spurningurin, tá ið vit skulu royna at forklára hví Eik kom í fíggjarligt ófløri.

Reidar Nónfjall heldur, at tað er ikki nakað skeivt í at taka á seg váðar í sambandi við vinnuligt virksemi.

– Tann, ið ikki tekur ein váða á seg, má eisini vænta lægri inntøkur og avlop.

## Fekk merglop

Hann sigur, at tað eru ymisk viðurskifti, sum nú hava ført til, at Eik fór fyri bakka, líka frá leiðsluni til altjóða umstøðurnar.

Hann nevnir í fyrstu atløgu, at tað var í uppgangstíðum, at Eik var umlagdur til ein banka, sum síðan kundi vera við í vinnuligum útlánum og fyritakssemi.

– Henda umlegging, samantvinnað við kappingini um viðskiftafólk og marknaðarpart við BankNordik, hevur lagt trýst á leiðsluna um vøkstur.

– Síðani er tað blivið greitt, at vakstrar- og kappingarstrategi hjá Eik varð grundað í nøgd og sjónligheit, heldur enn dygdina í útlánunum og á skilagóð strategisk uppkeyp av útlendskum bankum.

– Leiðslan hevur ikki megnað at mett um útlánini og projektini í danska dótturfelagnum, áðrenn keypið og tí kom bankin at liggja innibrendur við virðisleysum projektum, sum hann setti pening í.

Hann leggur afturat, at fyri at gjøgnumføra ein skjótan vøkstur, verður vanliga farið undir at keypa og stovna íløgufeløg av ymiskum slag.

– Íløgufeløgini í Eik-samtakinum eru eisini fíggjarliga miseydnað, tað er Notio eitt dømi um, sigur Reidar Nónfjall.

Hann sigur, at við hesi vakstrar- og kappingarstrategi, fekk Eik volumusjúku ella merglop.

– Tað merkir, at leiðslan, uttan at vita tað sjálv, hevur niðurraðfest planlegging, stýring og eftirlit. Tá er skjótt, at ein leiðsla missur dømikraftina, er hon ikki nóg sterk og dugnalig.

Reidar Nónfjall sigur, at eitt, ið hevur eyðkent Eik er, at vinnulívsmenn eru settir í leiðslu- og álitisstørv og teimum misti forstjórin tamarhaldið á.

– Hesir vinnulívsmenn hava í veruleikanum eisini veitt lán til sítt egna virksemi og hava verið ógegnigir.

– Henda korrumperandi tilgongdin sæst aftur í gomlu nevndini í Fiskavirking við tað, at tey fólk, sum ganga aftur, eru øll úr Eysturoy og røkja aðrar netverkspostar.

– Núverandi formaður er eisini úr Eysturoynni, leggur hann afturat.

## Nikkidukkur

Reidar Nónfjall staðfestir, at leiðslu- og organisatiónsbygnaðurin í Eik hevur í veruleikanum virkað so, at bankin hevur verið stjórastýrdur.

– Strategiska leiðsluuppgávan hjá nevndini, har ein uppgáva er at føra eftirlit við stjóranum, hevur als ikki virkað.

– Danir kalla slíkar nevndir "tantebestyrelser". Á føroyskum kunnu vit kalla teir nikkudukkur.

– Nevndin hevur als ikki verið professionel. Formaðurin í Eik-nevndini hevur eisini verið nevndarformaður í Eik-grunnum og tað hevur ført við sær, at ørskapurin fekk frítt spæl, uttan nakað gjøgnumskygnið.

– Sjálvt um hesin kritikkur varð reistur herfyri, hevði tað onga ávirkan á formannin. Søgan hevur síðani víst, hví tað er, tí hann vildu sjálvandi verja fyri, at nakar sá inn í allar "kirkjugarðarnar" í samtakinum.

Nevndin hevur heldur ikki havt ein dominerandi partaeigaraskara, sum hevur sett krøv um, hvussu teirra kapitalur skal umsitast.

**» Danir kalla slíkar nevndir »tantebestyrelser«. Á føroyskum kunnu vit kalla teir nikkudukkur**